Landsroknskapur
Gjaldstovan

Ymiskt um roknskap

2026

Innihaldsyvirlit

Endamál 2

Freistir, kunning o.a 2

Dagfestingar 2

Bókingar í tíðarskeiði 13 2

Bókingar um ársskiftið 3

Tá árið er afturlatið fyri bókingum hjá stovnum 3

Um tíðaravmarkingar 3

Útreiðslur 4

Lønir 4

Inntøkur 4

01 Immateriellur og materiellur útbúnaður 5

03 Goymslur og áogn 6

031 Goymslur 6

032 Tænastu-, vøruskuldarar o.t. – 033 Skatta-, toll- o.t. skuldarar 6

035 Ávegisgjøld, forskot og útlegg 6

037 Tíðaravmarkingar og onnur áogn 6

04 Virðisbrøv og tøkur peningur 7

06 Roknskapartøknilig-, avstemmingar- og skrásetingarkonta 8

08 Stuttfreistað skuld 9

083 Skuld, avgjøld 9

0865 Tíðaravmarkan 9

088 Onnur stuttfreistað skuld 9

0881 Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. 9

0888 Skuld, annað 9

Kreditorar 9

Endamál

Hetta skjal er gjørt til at skapa struktur í samband við ársroknskapin og at tryggja, at tey týdningarmiklastu økini verða gjøgnumgingin, so ársroknskapurin er rættvísandi.

Skjalið er ikki úttømandi og kemur ikki ístaðin fyri eina nágreiniliga gjøgnumgongd við bókhaldara ella grannskoðara, men tað kann nýtast sum eitt yvirskipað amboð hjá almennum stovnum til at avslutta ársroknskapin, og stovnurin kann tillaga tað til egna nýtslu.

Freistir, kunning o.a.

Gjaldstovan brúkar 3 miðlar at senda kunning út – á heimasíðuni, BSL-portalinum og við telduposti. Sì eisini Ársroknskapur 2026 og Roknskapargóðkenning.

Fráboðanir verða eisini sendar, so hvørt ymisku freistirnar nærkast.

Dagfestingar

Bókingar, sum skulu við í 12. tíðarskeið í 2026, skulu hava bókingardagfestingina **27.12.2026**

Í Kreditor, Verkgongd og Debitor skal 27.12.2026 ella 12-26 skrivast í teigin ”GL Date”.

Bókingar, sum skulu við í 13. tíðarskeið í 2026, skulu hava bókingardagfestingina **28.12.2026**

Í Kreditor, Verkgongd og Debitor skal 28.12.2026 ella 13-26 skrivast í teigin ”GL Date”.

Aðrar góðkendar búskaparskipanir, sum senda inn upplýsingar via webservice, skulu brúka bókingardagfestingina 27. desember 2026.

Minnist til ikki at brúka dagfestingarnar 29., 30. og 31. desember sum ”GL Date”.

Bókingar í tíðarskeiði 13

Tíðarskeið 13 letur upp, tá tíðarskeið 12 er latið aftur.

Tíðarskeið 13-26 er opið til og við 12. mars 2027, sum er síðsti dagur, stovnarnir sjálvir sleppa at bóka á fíggjarárið 2026.

Gev gætur, at her er talan um Høvuðsbók - seinasta lønarkoyring fyri árið verður nakað undan hesum, og Debitor, Kreditor og Verkgongd lata eisini aftur nakrar dagar áðrenn – meira kunning kemur um hetta seinni.

Aftaná 12. mars er tað bara Gjaldstovan, sum kann bóka á fíggjarárið 2026.

Bókingar um ársskiftið

Heitt verður á stovnarnar, ið senda Gjaldstovuni skjøl at bóka, um at gera Gjaldstovuna varuga við, hvørji skjøl skulu bókast á fíggjarárið 2026. Tað verið seg lønarumbønir, kreditorfakturar o.a.

Frá 1. januar 2027 verður heitt á stovnarnar at eyðmerkja roknskaparskjølini við ávikavist "2026" og "2027".

Gevið gætur, at rokningar frá veitarum verða bókaðar á rætt fíggjarár. Tvs. um fakturadagfestingin er í 2027, men transaktiónin hoyrir til 2026, so er neyðugt at broyta GL-Date til 12-26 ella 13-26. Tað sama er galdandi fyri rokningar dagfestar í 2026, men har tað hoyrir til 2027 – har má GL-date broytast til 01-27 ella 02-27.

Tá árið er afturlatið fyri bókingum hjá stovnum

Verða stovnar varugir við týðandi skeivleikar í roknskapum sínum, skulu teir skjótast gjørligt seta seg í samband við Gjaldstovuna fyri at rætta møguligar skeivleikar.

Týðandi skeivleiki merkir, at um skeivleikin ikki verður rættaður, so fær ein uttanhýsis roknskaparlesari skeiva fatan av roknskapinum.

Flytingar millum innanhýsis útgreiningar í roknskapinum (støð, endamál, verkætlanir) eru ikki týðandi skeivleikar fyri uttanhýsis lesaran.

Harafturímóti eru vantandi skrásetingar av stórum inntøkum og útreiðslum, herímillum skeiv ella vantandi tíðaravmarkan at rokna sum týðandi skeivleiki.

Víst verður eisini til skjølini undir Roknskapargóðkenning á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, sum allir stovnar eiga at hava kunnleika til.

Um tíðaravmarkingar

Galdandi reglur fyri tíðaravmarkan eru í §13 í roknskaparkunngerðini. Tað áliggur stovnum at kanna, at tíðaravmarkingar av útreiðslum og inntøkum um ársskiftið eru rættar.

Útreiðslur

Tíðaravmarkingar skulu gerast, um stovnurin veit at ein rokning fer at koma, men hon ikki er komin, áðrenn roknskaparárið verður latið eftir. Tað kann eisini vera ósemja um upphæddina. Stovnurin skal gera eina meting av útreiðsluni, sum hoyrir til farna roknskaparár, og bóka hana á raksturin og mótkontan er í fíggjarstøðuni, vanliga StRk 0888.

Tá stovnurin hevur fingið rokningina, skal tíðaravmarkingin afturførast. Um rokningin av onkrari orsøk fellur burtur, og avsetta upphæddin harvið ikki verður nýtt til ætlaða endamálið, so fellur hon aftur til landskassan.

Frávik frá veitingarmeginregluni um ársskiftið - bert fyri vørur

Sambært § 13 stk. 2 í roknskaparkunngerðini kunnu vørur, latnar fram til 15. februar 2027, skrásetast uppá fíggjarárið 2026, um keypsavtala varð gjørd í 2026. Legg til merkis, at talan er bert um vørur, sum veitari av flutningsorsøkum o.l., ikki klárar at veita fyri ársskiftið. Talan er ikki um tænastur.

Lønir

Fíggjarmálaráðið hevur í rundskrivi nágreinað, hvussu lønir skulu verða tíðaravmarkaðar.

Inntøkur

Meginreglurnar eru tær somu, tað, sum hevur týdning, er, at stovnurin við árslok hevur vunnið sær rættin til eina inntøku.

01 Immateriellur og materiellur útbúnaður

Íløgur og útvegan av útbúnaði annars verður útreiðsluført á høvuðsslag 3 ella Standardkonto 15.

Umframt sjálva bókingina, skulu allar almennar ognir skulu verða skrásetast – hetta framgongur av §20 í roknskaparkunngerðini, har ásett er at yvirlit skal gerast yvir allar ognir og útbúnað, sum hava eitt keypsvirði yvir kr. 50.000.

Sí eisini skjalið roknskaparvegleiðingina Skráseting í roknskapi landsins av øllum almennum ognum á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, sum hevur nærri útgreiningar – m.a. hvørjir upplýsingar skulu við.

Oyðubløð til endamálið eru eisini at finna á heimasíðuni – stovnurin útfyllir skjølini og sendir til Gjaldstovuna, sum skrásetir hesi í skipanini.

Tá aktiv verða seld ella við frágongd annars, skal hetta eisini fráboðast Gjaldstovuni, so skrásetingin í skipanini kann broytast samsvarandi

Til ber at skráseta/broyta skrásetingar fram til tíðarskeið 13-26 verður latið aftur.

03 Goymslur og áogn

031 Goymslur

Stovnar skulu føra yvirlit yvir vørugoymslur, uttan so at goymsluvirði nærum ongan týdning hevur. Tó eru bert fáir stovnar, har goymslan hevur eitt roknskaparligt virði, tí tað skal ein játtanarheimild verða til tað – sí roknskaparkunngerðina § 19.

032 Tænastu-, vøruskuldarar o.t. – 033 Skatta-, toll- o.t. skuldarar

Tað áliggur stovnum at hava eftirlit við skuldarakontum og ansa eftir, at tal og støddd av skuldarum ikki verður størri enn neyðugt. Um neyðugt skulu innkrevjingartiltøk setast í verk fyri at sleppa undan/avmarka tap – sí roknskaparkunngerðina § 17 og rundskriv 9001 frá 2011 um eftir og at taka neyðug búskaparlig atlit.

Avsetast skal eisini móti tapi, tá útlit ikki eru fyri at kravið verður goldið – nærri reglur um hetta eru at finna í roknskaparmeginreglunum á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

Avsetingin móti tapi er ein rein finansbóking, og sjálvt kravið mótvegis borgara/virki verður ikki slept, fyrrenn kravið hevur mist rættargildið ella er goldið. Tað er stovnurin, sum skal meta um væntaða tapið.

Krøv, ið hava mist rættargildið ella verða eftirgivin, verða avskrivað. Sí eisini leinkjuna um fyrning av skuld á heimasíðuni.

035 Ávegisgjøld, forskot og útlegg

StRk 0358 og 0359 skulu gjøgnumgangast fyri at tryggja at øll ferðaforskot eru gjørd upp og goldin fyri roknskaparárið 2026. Í hesum sambandi verður eisini víst til rundskriv frá Lønardeildini um tænastuferðir uttanlands, har tað er ásett, at ferðauppgerðir skulu verða gjørdar upp og møgulig restupphædd goldin aftur innan 3 vikur eftir heimkomu.

037 Tíðaravmarkingar og onnur áogn

Her verða tíðaravmarking undir aktivum førdar. Talan kann t.d. verða um forútgoldna løn ella áogn, har rokning ikki er skrivað enn.

04 Virðisbrøv og tøkur peningur

Tøkur peningur í fíggjarstøðu stovnsins skal verða rættur við árslok. Tað vil siga, at saldo í bókhaldinum skal stemma við saldo sambært kontuavrit frá banka ella við kassauppteljing. Tað sama er galdandi leypandi gjøgnum árið. Um stovnurin hevur kassa, skal hesin vera taldur upp við árslok. Tað áliggur eisini stovnsleiðarinum at gera ófráboðað kassaeftirlit, soleiðis at vissa kann fáast fyri, at virðini eru til staðar.

Talan er um hesar standardroknskaparkontur:

Bankar/gjaldskortkontur: 0416, 0419, 0423, 0426 ella 0429 – tá ið uppgerð fyri bankan er bókað pr 31.12.2026, skal saldan í bókhaldinum vísa tað sama sum kontuavrit bankans pr 31.12.2026.

Kassar: 0438 – tá ið uppgerð fyri kassan er bókað pr 31.12.2026, skal saldan í bókhaldinum vísa tað sama sum kassauppteljingin pr 31.12.2026.

Sí eisini punktið um 0643 og 0649.

06 Roknskapartøknilig-, avstemmingar- og skrásetingarkonta

Generelt er galdandi fyri hesar kontur, at tær verða brúktar ísv. avstemmingar gjøgnum árið til fyribils bókingar, áðrenn upphæddirnar koma uppá pláss. Hesar eiga ikki at hava nakra saldo, tí um saldan er 0, stemma bankar ella kassar ikki, og raksturin er møguliga heldur ikki rættur. Sigast kann um hesar kontur, at tær eru ein millumlending millum tveir kassar. Antin er peningurin í kassa 1 ella í kassa 2. Um salda er á kontum 06xx, so sigur stovnurin, at peningurin er hvørki í kassa 1 ella kassa 2

Nakrar av kontunum eru nærri gjøgnumgingnar niðanfyri.

Konta 0643-1000

Stovnar, sum hava gjaldskortterminal knýttan at kassanum, brúka hesa kontu. Saldan á hesi kontu skal svara til tað, sum enn ikki er komið inn í bankan. “Kassabeholdningur”, tá ið stovnur hevur terminal, er: taldur peningur pr ávíst dato + tað, sum er í terminalinum pr sama dato. Her skal saldan ongantíð vera “kredit”. Saldan er dagliga debet, til peningur kemur í bankan – tá verður bankin debiteraður og 0643-1000 krediterað.

Konta 0643-1300

Stovnar, sum hava bæði kassa og banka nýta hesa kontu at flyta peningin millum kontur við. Kontan verður debiterað í uppgerð fyri tann kassa, sum rindar pening út – og krediterað í uppgerð fyri tann kassa, sum móttekur pening. Vit síggja beinanveg, at “debet millumrokning” merkir “kredit (minkandi) kassasalda” – og “kredit millumrokning” merkir “debet (vaksandi) kassasalda”.

Konta 0649-0000

Hendan konta verður brúkt, tá ið gjaldføri verður flutt millum landskassan og stovnin – bæði kassaáfylling og kassatøming. Eins og við kontu 0643-1300, so verður hendan konta debiterað í uppgerð fyri tann “kassa”, sum rindar pening út – og krediterað í uppgerð fyri tann “kassa”, sum móttekur pening.

Kontur 0649-1000 og 0649-1100, sum eru settar upp til sjálvvirkandi tømingar mótvegis landskassanum, hava somu funku sum 0649-0000.

08 Stuttfreistað skuld

Yvirskipað er galdandi, at stovnurin skal kunnu nágreina, hvørjar upphæddirnar á hesum kontum eru. Niðanfyri eru viðurskifti fyri útvaldar kontur lýst

083 Skuld, avgjøld

Stovnar, sum eru MVG-skrásettir, skulu avroknað MVG til TAKS. Saldan á hesum kontum skal samsvara við MVG-avrokningina pr. 31.12.2026 + møguligar ógoldnar uppgerðir frammanundan hesum.

0865 Tíðaravmarkan

Her skulu tíðaravmarkingar undir passivum førast. Talan kann t.d. verða um forútgjald frá skuldarum, har inntøkan hoyrir til í komandi ári

088 Onnur stuttfreistað skuld

0881 Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.

Hendan kontan verður nýtt til at støðla fremmanda fígging – t.d. frá Norðurlandaráðnum til verkætlanir

0888 Skuld, annað

Hendan konto verður fyri tað mesta nýtt til lønaravsetingar – t.d. avsett til serstaka fríviku. Sí eisini punkt um tíðaravmarkingar av lønum longur frammi í hesum skrivi.

Kreditorar

Stovnarnir sjálvir hava ikki eina samlikonto fyri kreditorar, tí hetta er samlað á einum stovnsnr. fyri allar almennar stovnar.

Men tað áliggur stovnunum at stemma sínar kreditorar av um ársskifti og annars leypandi gjøgnum árið. Tvs. móttikin kontoavrit og rykkjarir frá veitarum skulu samanberast við saldo í kreditor í LKS. Um ósamsvar er og/ella rokningar mangla, skal greiða fáast á hesum. Annars er vandi fyri, at tað eru rokningar, sum ongantíð eru skrásettar.